# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Virðiligar virðislønir

Mentanarvirðisløn Landsins er sum kunnugt latin Zachariasi Heinesen, listamanni. Heiðursgáva Landsins er latin Jógvani Isaksen. Tað man vera vanlig semja um, at Mentamálaráðharrin her her havt eina heppna hond. Báðir menn hava hvør á sínum øki framt stór mentanarlig avrik, sum avgjørt hava uppiborið samfelagsins viðurkenning og tøkk.

Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Zachariasi Heinesen, fyrst og fremst fyri hansara framúr góðu listaverk og harumframt týdning hansara fyri myndlistina og menning hennara í Føroyum. Zacharias hevur hevur ígjøgnum eina lívslanga listarliga tilgongd havt eina tráan eftir nýggjum avbjóðingum og margfeldi, men tað er kanska mest av øllum hansara heilt egna og djarva ekspressionistiska landslagsmynd, ið stendur sum ein varði eftir hann og sum eisini hevur kveikt listarliga neistan í mongum av okkara listafólkum. Zacharias Heinesen eigur ein týdningarmiklan part í føroyskari myndlistasøgu, sigur nevndin, sum innstillar Zacharias til virðislønina. Beinrakin orð, sum vit hervið loyva okkum at gera til okkara.

Jógvan Isaksen fekk Heiðursgáva Landsins fyri hansara fjølvirkna leiklut á tí føroyska mentanarpallinum. Sum bókmentafrøðingur hevur Jógvan í greinum, bókum og monografiskum lýsingum av einstøkum høvundum varpað ljós bæði á ritverkið og serstakliga á føroyskar bókmentir í seinasta triðingi av 20. øld. Jógvan er eisini krimirithøvundur og hevur hetta talt við. Hann ger eisini eitt megnararbeiði uttanlands fyri at promovera føroyskar bókmentir.

Virðislønirnar eru eitt sera gott tiltak. Tær minna okkum á tann týdning, sum mentan og list hava fyri tjóðina. Mentan og list hava vaksandi týdning í eini tíð, har alt størri dentur tykist verða lagdur á materiellu virðini. Men myndugleikarnir, løgting og landsstýri, eiga ikki at goyma, at fyri at kunna skapa stór listaverk, mugu listafólk hava sømilig arbeiðskor. Fyri at mentan kann blóma er neyðugt at geva mentanarstovnunum góðar virkismøguleikar. Hesi viðurskifti eru sera væl lýst í Visjón 2015, og tí er at vóna, at politikkarar taka sína egnu visjón í fullum álvara. Hetta er ein fortreytin fyri, at mentan og list kunnu blóma í Føroyum.

**Sosialurin**

## Royking er harðskapur

SÁMAL MATRAS KRISTIANSEN
ikki-roykjari



Enn einaferð er eldur festur í kjakið um royking á almennum støðum. Grundgevingarnar eru nógvar bæði fyri ella ímóti, og ikki skulu hesar grundgevingar gjøgnumgangast í hesum brævi.

Tó vil eg gjarna greiða frá míni støðu til royking. Fyri meg at síggja er royking harðskapur. Royking er ikki einans skaðilig, tað er so nógv annað eisini. Avgerandi trupulleikin er, at tá roykt verður, har onnur eru til staðar, tá fremur roykjarin harðskap móti hinum. Í minsta lagi eigur roykjarin altíð at spyrja, um tað er í lagi, at harðskapurin verður framdur. Tað er greitt, at hjá øðrum, ið roykja, kennist royking ikki sum harðskapur, men hjá nógvum ikki-roykjarum er talan um sera grovan ágang.

**At roykja og at sláa**

Øll munnu vera samd um, at tað er skeivt at sláa onnur í einum handli, á eini skrivstovu, í einum bili – ja eisini í privata heiminum. Øll munnu vera samd um, at talan er um harðskap, ið í størri ella minni mun skaðar ofrið.

Færri munnu geva sær gætur um, at tá fólk roykja í einum handli, á eini skrivstovu, í einum bili – ja eisini í privata heiminum – tá fremja hesi harðskap móti teimum, ið ikki ynskja hendan roykin. Og í summum førum er tað helst eitt størri brotsverk at blása tubbaksroyk á ein annan persón enn tað er at sláa ein annan persón. Tubbaksroykur kann jú í longdini føra til ræðuligar sjúkur, og hetta er vert at hugsa um hjá einum pápa, ið blæsur tubbaksroyk á børnini hjá sær. Ein slíkur pápi eigur at skilja, at hann spælir hazard við heilsuna hjá børnum sínum.

At roykja meðan onnur eru hjástødd er ágangur, harðskapur og ómetaliga sjálvsøkin atburður. Men hvat ein roykjari ger, tá viðkomandi ikki er saman við øðrum, er líkamikið. Tað finst jú heldur eingin lóggáva móti at sláa seg sjálvan...

## Til Edmund Joensen, løgtingsformann

JÓGVAN E. ÓSÁ
josa@post.olivant.fo





Nú tygum skjótt fara at fáa 16 ára gomul í løgtingið, mugu tygum hugsa um, at tingskipanin verður broytt, og tað má farast í gongd beinanvegin.

Eitt tað fyrsta ið, man gerast – og sum kann taka eitt sindur av tíð – er, at tingsalurin má gerast størri, tí tað verður brúk fyri fleiri sessum. Her hugsi eg um, at tey 16 ára gomlu mugu hava pápa, mammu ella verja við sær í løgtingið, tá ið tey skulu trýsta á knøttin. Og kunnu hesi ikki møta, so má barnaverndin møta í staðin.

Eisini mugu tygum minnast til at siga við løgtingslimir, at tað er ikki loyvi til at "klistra" tyggigummi upp undir borðini.

Vit sum dagliga fylgja við í løgtinginum í sjónvarpinum fara eisini at heita á tygum um at fáa eitt "kamera" uttan fyri løgtingsalin, so vit síggja, hvat í løgtingslimir gera, tá ið teir hava fríkorter.

Vit vilja fegin fylgja við, tá ið Hendrik Old og Kjartan Joensen fara at lakka paradís. Eisini vilja vit fegin síggja, tá ið tygum og Annfinn Kallsberg fara at hoppa um band. Her vil eg halda, at tygum eiga at syrgja fyri, at tað verður Jógvan við Keldu og Kári P. Højgard, ið vinda bandið, og ikki tey 16-ára gomlu, tí tey vinda so týtt.

Eisini vil eg halda, at tað verður hugnaligt at síggja, tá ið Lisbeth, Annita og Heidi fara at skifta um glansbíløt.

At halda skil á hesum, vita vit, at tygum eru sera væl egnaður. Nú koma tygara royndir at ansa eftir sílum og laksi – saman við Júst í Túni – til sín rætt. Hetta vita vit, ið hava lisið bókina um Júst í Túni.

Eitt afturat. Syrg fyri at vit framvegis hava tað skipan, at tey rætta hondina upp, tá ið tey biðja lova sær á WC.

Klaksvík hin 15. januar 2006.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.